VIÐMERKINGAR

# Skal danskt niðurprioriterast í fólkaskúlanum?

**Jákup Sverri Kass**
*stud.cand.ling.merc*



Tað er flest øllum greitt, at altjóðagerðin setur síni krøv til allar partar av føroyska samfelagnum, eisini málpolitikkin. Føroyingar eiga tískil eisini við jøvnum millumbilum at gera sær greitt, hvussu vit á besta hátt tillaga okkum.

Eg læs herfyri eina grein hjá Óla Samró, har hann í eini áhugaverdari grein hugleiddi um vaksandi leiklutin hjá enska málinum í altjóða høpi. Hann kom millum annað inn á, hvussu fólkaskúlin í Føroyum í framtíðini eigur at raðfesta enskt og danskt. Og niðurstøðan tyktist vera tann, at enskt eigur at fáa framíhjárætt.

Eg eri vælvitandi um, at enskt er dominerandi á altjóða leikpallinum. Men føroysk børn, eins og onnur børn i vesturheiminum, í dag fáa enskt inn við móðirmjólkini. Sjónvarp og telda gera, at børnini læra ein stóran part av enskum, langt áðrenn tey fáa tað sum lærugrein í fólkaskúlanum.

Veruleikin er tann at føroyingar við og uttan familju fara enn í stóran mun til Danmarkar at arbeiða, lesa ella bara fyri at venda. Danskt gevur ungum, sum gomlum, ein førleika, sum tey neyvan vildu verið fyri uttan, tá ið tey velja at skifta føroyska gerandisdagin út við tann danska.

Summi hava lyndi til at blanda tjóðsskap og tjóðskaparkenslur uppí alt. Tað meini eg ikki vera rætt. Hóast núverandi raðfesting av donskum í fólkaskúlanum er eitt úrslit av ríkisrættarligu støðu okkara, gevur danska málið okkum í dag ein førleika, sum skapar fleiri møguleikar - ikki færri.

Vit hava øll sæð, hvussu íslendska samanblandingin av tjóðskaparpolitikki og málpolitikki hevur máða støðið undan tí íslendska kunnleikanum til danskt og norðurlendskt sum heild. Íslendingar, serliga tað yngra ættarliðið, hava í dag, sera ringt við at samskifta við sínar norðurlendsku grannar. Og skal samskiftast, so vilja íslendingar allarhelst samskifta á enskum.

Fyri føroyingar er danskt ikki bara lykilin til víðarilesna í Danmark. Norðurlondini hava eina felags søgu, mentan og arv. Og okkara kunnleiki til danskt og/ella norðurlendskt er við til at styrkja okkara samband við okkara norðurlendsku grannar, bæði á tí mentunarliga og á tí búðskaparliga økinum.

Fyri at venda aftur til lærugreinina, danskt, so meini eg, at lærugreinin sjálvsagt kann betrast. Man kundi hugsað sær, at lærugreinin í størri mun legði upp til eitt sindur meira av kunnleika til hini norðurlendsku málini, og kanska kundi man gjørt danskt til eina valgfríða lærugrein á studenta ella handilsskúla. Við at gera tað valfrítt, so kundu næmingar sum ætla sær niður til Danmarkar at lesa valgt tað, ímeðan tey sum t.d. ætla sær á Fróðskaparsetri ella til Bretlands fingu møguleikan at velja okkurt annað.

Heimurin stendur ikki í stað, og velja føroyingar framyvir í størri mun at fara aðrastaðni enn til Danmarkar ella norðurlond at lesa, so skal leikluturin hjá donskum í fólkaskúlanum sjálvandi takast upp til viðgerðar, og kanska raðfestast niður. Men sum støðan er í dag, so venda føroyingar enn eyga ímóti Danmark, og kunnleiki okkara til danskt er harvið eitt hent amboð at hava við sær av landinum.

# Sjálvandi hevur tað avleiðingar

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Hóast Føroya fólk fekk at vita, at tað ongar avleiðingar fór at fáa fyri vælferðina og skatta- og avgjaldstrýstið hjá føroyingum, at heildarveitingin varð skorðin við 366 mió. krónum árliga, so merkja vit longu nú avleiðingarnar av niðurskurðinum. Politiska og vinnuliga avbjóðingin er tí at finna nýggjar inntøkumøguleikar, sum í minsta lagi svara til niðurskurðin í inntøkunum.

Føroyska vinnulívið koyrir framvegis í alt ov stóran mun eftur kreppuloysnunum frá 90-árunum. Hesum skulu vit koma burtur úr, og í staðin skulu nýggj vakstrarfremjandi tiltøk setast í verk.

- Vit skulu finna eina nýggja skipan fyri fjarfiskiflotan
- Partabrævamarknaðurin skal fáast at virka sum skjótast
- Einskiljingar skulu gerast
- Okkara rávørutilfeingi skal virðisøkjast her á landi
- Vit skulu menna granskingar- og íløguumhvørvið

Ein nýggj skipan skal gerast fyri allan fjarfiskiflotan, soleiðis at honum verður lív lagað. Neyðugt er at verja søguliga vunnin rættindi, soleiðis at partar av fjarfiskiflotanum ikki detttur niðurfyri, áðrenn endaliga loysnin er sett í verk.

Tá partabrævamarknaðurin í Íslandi fór at virka fyri 15 árum síðani, blásti hann nýtt lív í íslendsku vinnuna. Hetta eiga vit eisini at fáa at virka í Føroyum sum skjótast, og í sama viðfangi eiga almennar fyritøkur at vera einskildar. Eingin ivi kann vera um, at tað er sunt fyri bæði vinnuna og tann einstaka, at tú og eg fáa loyvi at vera ábyrgdarpartur í vinnuni.

Tað kann ikki vera rætt, at okkara rávørutilfeingið verður virðisøkt í útlondum, meðan fólk ganga arbeiðsleys í Føroyum. Her skulu skipanir gerast, soleiðis at fiskiríkidømið verður virðisøkt her á landi. Óneyðugt skal vera hjá okkara kappingarneytum at virðisøkja vøruna, áðrenn hon kemur til endaliga brúkaran.

Tá gransking verður nevnd, so verður her ikki hugsað um hagtalsgreiningar ella gransking at knýta afturat miðnámsútbúgvingum. Heldur verður hugsað um eitt veruligt granskingarumhvørvi við nyttugransking, sum í seinna enda gevur vinning fyri samfelagið.

Hetta eru nakrar av fyrstu treytunum fyri at normalisera eitt vinnulív, sum enn koyrir eftir kreppuloysnum frá 90-árunum. Vit noyðast at finna nýggjar inntøkur, fyri at føroyingar ikki skulu merkja alt ov nóg til avleiðingarnar av, at heildarveitingin úr Danmark er skorin niður.

# Einki er sum ein føroyingur... og einki er sum ein føroysk mamma!

**Frits Johannesen**



Tað var á einum sinni, at Johan Nielsen, sáli, var í útvarpinum í eini valsending til Fólkatingið og mælti hesi orð: Einki var sum ein føroysk mamma! Eg helt hetta vera ørvitistos, men Johan Nilesen visti, hvat hann segði. Hetta fall óivað í góða jørð hjá mongum, sum lurtaðu. Hann var í listumlærdur og orðaríkur sum fáur.

Morgunin eftir bar eg hetta upp á mál á lærarastovuni um hesa framsøgnina hjá Johan Nielsen. Tá helt ein eldri lærari fyri, at einki var sum ein føroysk trúgvandi mamma! Nei, nú bar einki til. Hann komi til mín, og Gud gevi mær tann góðan tíð at tala! Tá var eg nýklaktur lærari og skuldi fara at siga tí eldra læraranum ímóti, men í sama andadrátti segði ein annar, ið hevði starvast í Fuglafjarðar skúla í fleiri ár við tann eldra læraran. " Hvat heldur tú um ta vietnamesisku mammuna, (Vietnamkríggið) sum liggur og doyr niðri í Vietnam við barni sínum í fanginum. Hevur hon ikki somu føling fyri sínum barni eins og tann føroyska mamman? Ella, hvat heldur tú um ta islamittisku mammuna, hevur hon ikki somu kenslur fyri sínum barni eins og tann føroyska mamman? Eldri lærarin sat, sum lundi sligin á nevið, og tað kvæddi ikki av honum, men eitt lítið bros fór um andlitið eins og eitt eftirsjóð av fávitskutu meiningini, sum fór sum døgg fyri sól.

Hoyri eisini, at ofta verður sagt, at einki er sum ein føroyskur sjómaður.. ja, ein føroyingur! Nei, tað vóru útlendingarnir, sum møguliga verða riknir av garði og hábundnir. Løgið er tað, at fólk, sum hava arbeitt í fleiri ár í hesum landi, skulu nú fara á ørmundarhúsið. Hví kunnu tey ikki vera her og fáa somu sømdir sum føroyingar? Er einki arbeiði, so lat tey koma undir somu viðurskifti sum føroyingar, sum gerast arbeiðsleysir... tí einki er sum ein føroyingur!

Nei, mær rann til hugs: Ein føroyingur! Hvør tók ímóti teimum ungu gentunum, sum blivu við barn í fimmti og seksti árunum? Var tað ikki mangan "Den danske Mødrehjælp"? Hvar fara tey samkyndu, tey, sum hava aids og tey, sum halda seg til teir rivnu brunnarnar bæði so og so? — Hvar fóru føroyingar í fimmti árunum, tá ið hungur stóð í durinum her á landi? Fóru tey ikki til Íslands ..... í fleiri ár, sjómenninir sigldu við norskum skipum, týskum trolarum og bæði maður og kvinna arbeiddu í Grønlandi.... í fleiri ár. Øll tóku væl ímóti føroyskum sjómonnum og føroyskum arbeiðarum. Tað sama hendi, meðan kreppan var í níti árunum.

Ja, hvat er ein føroyingur, og hvat er ein føroyskur politikari?

Hugsaði eisini um orðini javnaður og brøðralag. Er hetta bara ein syltitoyskrukka, sum stendur á eini hill og er hýggjuskotin?

Nei, einki er sum ein føroyskur lærari!!!!!!!

# Hvørjum skulu vit liva av ?

**Johan Mortensen**
*Valevni hjá Tjóðveldisflokkinum til Býráðsvalið*



Sum tað fjólgaði mína gomlu fiskasølusál at hoyra at JFK Trol hevur gjørt ein stóran sáttmála við heimsfyritøkuna Marcks & Spencer. Chilled seafood, fiskur frystur í Barentshavinum, tiðnaður upp aftur og seldur sum feskar portiónir í Onglandi. Aftaná fyri hetta liggur miðvíst arbeiði, visiónir, motivatión og stuðul frá lokalsamfelagnum í Klaksvík og eitt Býráð sum stuðlar vinnulívinum í Klaksvík

Onki slíkt hoyrist í Tórshavn. Onki verður gjørt frá Býráðsins síðu fyri at gera tað attraktivt hjá útlendskum feløgum at koma henda vegin. Í okkara høvuðsstaði, sum skulu havt allar fyrimunir og møgulleikar til ymiskar framleiðslur er snøgt sagt ONKI, eg endurtaki ONKI sum eitur eitt kommunalt, vinnuligt umhvørvi. Vit eru vinarbýir við oljubýir sum Stavanger og Aberdeen — men hvat síggja vit til tað? Sweet nothing

Nýggja Tjóðveldis Býráðið fer at gera vinnulívið í Tórshavn meira virkið og skal stutt nevnast:

- Setast skal á stovn eitt progressivt vinnuráð við einum Vinnumálaráðharri fyri Tórshavn við einum budgetti uppá 25 Mio árliga til at stuðla og kveikja nyggjar vinnur.
- Arbeiðast skal aktivt við at fáa altjóða feløg at búseta seg í Tórshavn.
- Grundstykkir skulu latast uppá SERA lagaligar treytir til fólk sum fara undir framleiðslur.
- Oljuvinnan og frálandavinnan skal mennast í Tórshavn. Helikoptarastøð skal byggjast á Glyvursnesi til endamálið.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Jákup Andrias 50 ár

29. september fyllir Jákup Andrias Joensen í Klaksvík 50 ár



Hey Jákup Andrias, nú tú fyllir fimmti, so kunnu vit ikki gloyma teg sum bróður svágur mammubeiggi og ommubeiggi.

Ja Jákup Andrias, nú eru nógvir dropar runnir í havið síðan vit komu at kennast, ja sum svágrar tað man vera skjótt 30 ár síðan. Tú tókst væl ímóti mær, og eg kann siga, at vit eru sum brøður, og tú ert so góður við systir tína og børn okkara, ja ein góð fjørskilda.

Tá eg kom at kenna teg, vart tú til arbeiðis á fiskavirkinum á Kósini, og har starvast tú enn. Eg eri informeraður um, at tú ert nógv avhildin sum arbeiðari har, bæði av arbeiðarum og leilslu, tað hevur ikki so lítið at siga. Eg havi so mangan hugsað um, hvussu tú vilt koma til arbeiðis, líka mikið hvussu veðrið er. Á kósuna er alt títt, eg havi spurt systir tína, hvussu leingi tú hevur verið á sama arbeiðsplássi, eftir sum hon sigur, so eru 34 ár gingin. Tað er ikki so lítið á sama plássi, stanhaftigur má man siga.

Jákup Andrias er sonur Urbanus Joensen úr Gerðum í Klaksvik og Ingu Antoniussen av Morkranesi, tey eru tvey syskin, systirin er Bryngerð, sum býr á Kambsdali.

Fyri nøkrun árum síðan gjørdist mamman sjúk, hon hevði sukursjúkuna. Umkring áttatiárini misti hon annað beinið av sukursjúkuni, tá var hon bundin av rullustóli og av nógvari hjálp, so sum at fáa hana sprøjtaða og at geva henni at eta, og at koma sær í song og so framvegis av í tí sum hoyrir til av dagligari røkt. Men ikki at siga, at hon ikki fekk heimajálp, jú tað fekk hon, men tað er ikki allan sólaringin. Tá var tú sum ein góður sonur og hjálpti til hvussu so tíðliga og seint tað var á døgninum, tá systirin ikki var til staðar. Eg var so ofta til arbeiðis í Klaksvík og búði hjá svigarforeldrinun, tá hoyrdi eg J.A. fara upp til arbeiðis, og tað var ikki kl. 7.00, nei men kl. 6.00, og tað var at geva foreldrunun ein drekkamunn á songina, áðrenn hann fór til arbeiðis sjálvur.

Hetta vil ikki siga, at verfaðir ikki var um vermóðir sjálvur, jú tað var hann, hann fekk ein arbeiðisskaða undir lossing á Skipafelagnum, har hann kom í klemmu inni í einum kontainara av glasi, og stutt eftir fekk hann fleiri blóðproppar í høvdið, so hann gjørdist ikki meira arbeiðisførur, ja nærmast lamin. Ja so var tú teimun ein góður sonur og bróður, vit kundu vera trygg her á Kambsdali, vit vistu at tú røkti títt arbeiði og tíni kæru foreldur, ja 100%, tað skalt tú eiga.

Tú Jákup Andrias, eg havi hoyrt nakrar søgur um teg angangandi báti. Pápin vildi hava teg við ein dagin við snøri, ja tú fórt so olbragdur við honum og systirin. Tá tit vóru komnir út fyri Oyrum á Boroyavík, so byrjaði hesin sjógarpurin at fáa sjóverk. Ja heim til mammu, tað var loysnin, men at stima innaftur vildi pápin ikki, so var siglt inn til Oyrar, har vóru tit bæði sett á land. Men systirin, sum er ein sjóálka, vildi ikki fara í land, men hon mátti líða á pápans orð at fylgja tær til Klaksvíkar. Hon hevur sagt mær hetta, tað var ikki so blíð systur, tú hevði til fylgisvein heim til húsar tann dagin. At hon ikki kundi fara við snøri við pápa sínum, ja onkur er eftir sum kann fortelja undir borðhaldinun í kantinuni á Tekniska Skúla í Klaksvík.

PS. Tá vit gjørdu klárt til brúdleypið, var ein rotta komin inn í kjallarin, ja hon skuldi jú vekk, men hvør skuldi gera hetta. Vit báðir vildu ikki so gott, jú vermóðir, sum ikki ræddist nakað, hon var farin í herna móti hesari rottu, demdi fyri har sum tað kundi og hevði eitt hol opið, so hon kundi koma sær til rímingar, har hurðin stóð opin. Nei hon, rottan, fór ongan veg. So ein dagin gjørdust vit so stórir og raskir at vit kundu fáa hetta stóra dýri út, vit fingu okkum bæði klemmur, bond og annað, so henda rotta ikki skuldi koma okkum nakað til skaða. Brøkur og tað sum vit hugsaðu, hon kundi koma krúpandi til, var lukkað, ja so var farið í herna, vit opnaðu kjallarahurðina, høvdu pinnar at stinga við: Ja J.A. hevði næstan eina kanón, um hon skuldi koma alt og nær. Vit báðir lógu framav einum gomlum komfýri og prikaðu, nú hugsi eg at hetta er ikki nakað stuttligt, her má gerast nakað. Jú, hugskotið kom, sum vit liggja og pota takið eg hendan pinnin upp eftir lærinun á svágur og rópi "rottan er á lærinun hjá tær". Eg havi ikki sæð nakran mann lopið so høgt í einum, sum tá hann leyp upp á komfýrin í einum og rópti. Hon fór út tí í sama bili, fór tvísporandi út úr kjallarinun. Hann var yvirbevístur í eina langa tíð, um at rottan var á lærinun, har sum eg hevði pinnin. Men líkamikið, hetta ódjórið bleiv vekk, og vit báðir hava havt frið síðan og eru góðir svágrar og komast væl saman.

Leygardagin tann 2. oktober kl. 19 verður føðingardagurin hildin í kantinuni í Tekniska Skúla í Klaksvík, tey sum vilja koma og heilsa uppá Jákup Andrias eru vælkomin.

Við størstu hávirðing fyri tær.

**Systir tín Bryngerð,**
**Ingi og børnini.**

## Nýggjur sýslumaður



Kristjan Martin Joensen er settur sum sýslumaður í Runavík frá 1. oktober 2004 at rokna.

Starvið hevur verið røkt av Kristjan Martini, síðani 1. desember 2001, tá táverandi sýslumaðurin fór í annað starv, men nú verður hann so formliga settur í starvið.

Kristjan Martin er 54 ára gamal. Hann byrjaði hjá politinum í 1983, og síðani 1988 hevur hann virkað sum løgreglumaður her í Føroyum.




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800**

Sosialurin


## Dagurin

**29. september. Mikkjalsmessa**. Dagur hildin høvuðseinglinum Mikael til heiðurs. Ein av teimum mishalgidøgunum, sum nógv hevur verið hildið um í Føroyum, serstakliga av tí, at hann hevur verið so nær knýttur at seyðahaldi. Líka í hesi øldini vita fólk um at siga, at lestur hevur verið lisin mikkjalsmessudag eftir teksti úr Opinberingini (kap. 12, 7-12)

Dilkadagur.

Bíbilska navnið Mikael merkir *hvør er sum Harrin.*

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt vístu okkum so nógva umsorgan og samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi og abbi

**Lorenz á Krákusteini**

lá sjúkur, doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri alt hjálpsemi, fyri gávur, blómur og kransar, fyri troystarrík orð í kirkjuni og til sangarar og berarar og øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Eisini tøkk fyri gávur til Føroya felag móti krabbameini.

**Marjun, Niels Eli og Elin**